

## SF og DF vunnu

Sosialistiski Fólkaflokkurin og Danski Fólkaflokkurin vunnu ES-valið í Danmark í gjár. Undan valinum høvdu teir hvør sítt umboð í ES-tinginum, men nú hava teir tvey í part. Sosialdemokratarnir, Tey Radikalu og Junirørslan mistu hvør sítt umboð. Enn ber ikki til at siga við vissu, hvørji 13 eru vald, tí tær persónligu atkvøðurnar verða ikki taldar fyrr enn í dag. Kortini bendir alt á, at 10 valevni kunnu kenna seg rættiliga rtygg. Tey eru Dan Jørgensen, Britta Thomsen og Christel Schaldemose hjá Sosialdemokratunum, Margrethe Auken og Emilie Turunen úr SF, Jens Rohde og Morten Løkkegaard úr Vinstra, Bendt Bendtsen hjá Konservativa Fólkaflokkinum, Morten Messerschmidt úr DF og Søren Søndergaard úr Fólkafylkingini móti ES.

## Hava funnið 17 lík

Leitingarskip hava nú funnið 17 lík og fleiri vrakpetti frá vanlukkuni við Air France-flogfarinum. Brasilsku myndugleikarnir siga, at talan er um líkini av fýra monnum og fýra kvinnum, men hava myndugleikarnir einki sagt um tey seinastu níggju. Líkini eru funnin einar 250 fjórðingar norðan fyri oyggjarna Fernando de Noronha ella á somu leið, har skip funnu tvey lík og fleiri vrakpetti leygardagin. Leiðin, sum skip nú leita á, er einar 40 fjórðingar norðan fyri tað staðið, har Airbus-flogfarið seinast gav tekin frá sær.

# Vil hava øll børn og ung undir sama hatt

*Nú skal øll ábyrgdin fyri børnini og tey ungu savnast undir einum og sama myndugleika, tí sum støðan er nú er umsitingin ov fløkt. Útspælið frá Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu, er, at kommunurnar yvirtaka alt økið*

**Landsstýriskvinnan í almannamálum hevur nú bjóðað kommununum at umsita alt málsøkið, sum hevur við børn og ung at gera, men so skal ein pengaposi við 40-50 milliónum í, fylgja við**

BØRN OG UNG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Arbeitt verður nú við at leggja alt økið, sum hevur við børnini og tey ungu at gera, undir kommunurnar at umsita.

Tað er eitt økið, sum kostar minst 40-50 milliónir at umsita, umframt tað, sum kommunurnar longu nú betala.

Í løtuni liggur ein partur av økinum undir kommununum, men tað allarmesta liggur undir landinum.

Og Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum staðfestir, at tað sostatt mangan kemur fyri, at tað er ógreitt, akkurát, hvør umsitur hvat og tað ger umsitingina tórføra.

Sum støðan er nú, umsita kommunurnar barnaverndarstovuna og fosturforeldraskipanina, men landið umsitur restina, bæði stovnar til børn og ung, brekøkið og allar aðrar skipanir.

Tí vil hon hava alt økið, sum eitur børn og ung undir sama hatt, antin hjá landinum ella hjá kommununum.

Spurningurin hevur tí verið um landið skal yvirtaka barnaverndarstovuna aftur frá kommununum, ella um kommunurnar skulu yvirtaka alt málsøkið frá landinum.

Í hesum sambandi hevur Rósa Samuelsen spurt kommunurnar um tær eru áhugaðar í at yvirtaka alt málsøkið.

Í veruleikanum merkir tað, at alt økið skal undir barnaverndarstovuna, sum er ein felags kommunalur stovnur, at umsita, sigur Jóan Petur Hentze, aðalskrivari hjá Kommunusamskipan Føroya, KSF.

### Kostar 40-50 milliónir

KSF hevur svarað aftur, at felagið er sinnað at taka samráðingar upp um at yvirtaka alt økið, men Rósa Samuelsen sigur, at Kommunufelagið hevur ikki svarað enn.

Í løtuni er alt hetta eitt økið, sum í løtuni kostar landinum góðar 40 milliónir at umsita. Men harafturat kemur so tað, sum kommunurnar sjálvar betala fyri Barnaverndarstovuna.

Í summum kommunum ivast tey í, um hetta er nóg mikið, tí sparingar eru settar í verk á økinum í seinastuni.

Tí er ein arbeiðsbólkur nú settur at útgreina alt økið, tey tilboð, sum eru í dag og, hvør tørvurin er.

Í tí arbeiðsbólkinum eru umboð fyri almannaráðið, Almannastovuna, barnaverndartænastuna, kommunurnar og aðrar viðkomandi partar.

Men endar hetta við, at økið verður lagt undir kommunurnar at umsita, verður tað í fyrsta lagi frá 1. januar í 2011.

### Samhaldsføst skipan

Jóan Petur Hentze á Kommunusamskipan Føroya, sigur, at verður økið lagt undir kommunurnar, kann tað verða ógvuliga ymiskt, hvussu útreiðslurnar fella á teir ymsu kommunurnar.

Men hann sigur, at kommunurnar eru ógvuliga sinnaðar at finna eina samhaldsfasta skipan, har allar kommunurnar spjaða til, fyri at tryggja, at ongin kommuna kemur illa fyri fíggjarliga.

Hann sigur, at taka kommunurnar økið, vilja kommunurnar eisini fáa frælsi til at skipa aðrar stovnar enn teir, sum nú eru fyri at skipa raksturin effektivari.

Eitt nú eru øki, at stuðulsfólk eru, men har tað hevði verið skilabetri at skipa eina stovn ístaðin fyri.

# Vil sleppa undan at senda børn og ung av landinum

**Rósa Samuelsen vil hava fulla greiði, hvør hevur ábyrgdina av børnunum og teimum ungu**

BØRN OG UNG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit vilja hava fulla greiði á ábyrgdarbýtinum ímillum land og kommunur.

Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, sigur, at tað er orsøkin til at hon nú er farin at kanna um kommunurnar eru sinnaðar at yvirtaka alt økið, sum hevur við børn og ung at gera.

Hon staðfestir, at í løtuni umsita kommunurnar ein part og landið ein part og tað ger umsitingina óneyðuga stirvna og fløkta.

Tí vil hon hava, at alt økið verður savnað undir sama myndugleika.

Ein møguleiki er, at landið yvirtekur fosturforeldraskipanina og barnaverndarstovuna aftur frá kommununum.

Hin møguleikin er, at kommunurnar eisini yvirtaka allar stovnarnar, brekøkið og annars alla skipanina frá landinum, sum fevnir um øll børn og ung upp til 18 ár.

Tað týdningarmiklasta er at savna alt økið undir sama myndugleika, sigur landsstýriskvinnan í almannamálum.

Men útspælið frá henni er, at kommunurnar yvirtaka alt málsøkið.

Kommunusamskipan Føroya er sinnað at viðgera spurningin, men Kommunufelagið hevur ikki svarað enn.

Verður niðurstøðan, sum alt bendir á, at miðjast skal fram ímóti at leggja alt økið undir kommunurnar, verða samráðingar um, hvussu tað skal skipast.

Men, hvussu ber tað til at hetta stingur seg upp nú, samstundis sum ein bólkur situr og kannar eftir, hvørji málsøki skulu flytast frá landinum, yvir til kommunurnar?

Tað, sum vit royna at kanna eftir, er um málsøkið, sum eitur børn og ung, skal við í tann pakkan, sigur Rósa Samuelsen.

### Alt økið samskipast

Landsstýriskvinnan avsannar staðiliga, at orsøkin til hetta er bara tann, at landið vil skúgva eina útreiðslu frá sær, yvir á kommunurnar.

- Talan er eina og aleina um at samskipa alt økið undir sama myndugleika, tí tað ger umsitingina nógv greiðari, sigur hon.

Ì løtuni er hetta ein umsiting, sum kostar landinum einar 45 milliónir krónur og verður økið flutt undir kommunurnar, skal peningur sjálvandi fylgja við.

Men Rósa Samuelsen sigur at eitt endamál við at savna alla umsitingina á sama stað, er at menna tilboðini á økinum so at vit sleppa undan at senda børn og ung av landinum, soleiðis, sum vit gera í dag.